## Toyota leita eftir samstarvspartnara

Týskir fjølmiðlar upplýsa at Toyota leita sær eftir einum samstarvspartnara í Evropa. Týska bilblaðið „Auto, Motor und Sport“ vil vera við, at Toyota og Daimler AG, sum er týska Mercedes verksmiðjan, hava tosað saman um eventuelt samstarv við evropeisku Toyota verksmiðjurnar um m.a. felags plattformar. Sølan av Toyota bilum er í hesum árinum minkað við 26 prosentum í Evropa. Hvørki Toyota ella Daimler ynskja at gera viðmerkingar til tíðindini.

## Rock'n roll skeið í Vestmanna

Vikuskiftið 20. og 21. november skipar »Kom og Dansa« fyri seinasta dansiskeiði fyri jól. Hesaferð verður dansistovan í Vestmanna karmur um hetta dansiskeiðið. Kom og Dansa hevur skipað fyri fleiri skeiðum í heyst, m. a. Rock'n roll og Salsa. Eisini hevur skeið verið fyri børnum í alt heyst í Tórshavn. Tey halda frí í desember mánaði og ætla at byrja fleiri skeið aftur komandi ár, bæði fyri børnum og vaksnum. Vikuskiftisskeiðið í Vestmanna verður fríggjakvøldið 20. november klokkan 19 – 21 og heldur fram leygardagin 21. november klokkan 14 – 16. Øll eru sjálvandi vælkomin, bæði støk/pør, sigur Marylin Danielsen, ein av fyrireikarunum.

# Einki røkist fyri nýggjum vegi í Leirvík

**Hóast lisitatión var í sambandi við nýggjan veg gjøgnum Leirvíkar bygd longu 11. juni í ár, hava arbeiðstakarar, sum bjóðaðu upp á arbeiði, einki endaligt fingið at vita enn – og enn er eingin sáttmáli um gerð av hesum vegi undirskrivaður**

LEIRVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tíðliga í summar bjóðaði Landsverk út arbeiði at gera nýggjan veg, sum skal føra ferðsluna úr Norðoyatunlinum gjøgnum Leirvíkar bygd og í vegin, sum gongur omanfyri Tavuna og niðan í Leirvíkartunnilin.

Lisitatiónin upp á hesa verkætlan var á Landsverki hin 11. juni í ár. Sjey tilboð komu inn og lægsta boð, sum var 29,3 miljónir krónur, átti eitt samtak millum RTS Contractors, JHR Entreprenørar og Sea-Star Contractors.

Umframt tey sjey vanligu boðini, vóru eisini tvey alternativ boð, sum bæði lógu niðanfyri vanligu boðini. Lægsta alternativa boðið átti Arcticon, og tað var upp á 26,8 miljónir krónur.

Alternativu boðini merkja, at felagið hevur loyst onkrar uppgávur øðrvísi enn lýst er í útbjóðingartilfarninum.

### Óheppin støða

Andrias Lamhauge, stjóri í RTS Contractors, sigur, at enn hava teir, sum høvdu lægsta vanliga boðið, einki endaligt fingið at vita um, hvør fær arbeiði at gera nýggja vegin í Leirvík.

Hann sigur, at vanligt er, tá lisitatión hevur verið, at so fáa feløg, ið hava bjóðað innan fáar vikur at vita, hvør fær arbeiði.

- Vit hava verið í samband við Landsverk fleiri ferðir, men fáa bara at vita, at alt ikki er klárt enn, sigur Andrias Lamhauge.

Hann vísir á, at tað er óheppið, at so long tíð gongur, áðrenn greiða fæst á, hvør fær arbeiði, og nær farast skal í gongd.

- Hetta er ein stór verkætlan, og tí himprast tú við at bjóða upp á onnur stór arbeiði, tá tú ikki veitst, hvussu verður við vegnum gjøgnum Leirvík, har vit høvdu lægsta boð, sigur Andrias Lamhauge, stjóri í RTS Contractors.




*- Leirvíkarvegurin er ein stór verkætlan, og tá tú hevur lægsta boð, himprast tú við at bjóða upp á onnur stór arbeiði, so leingi ógreiða er um hesa verkætlan, sigur Andrias Lamhauge, stjóri í RTS Contractors*

# Løgtingið má broyta verklagslógina



**Stjórin í Landsverki væntar, at verkætlanin í Leirvík verður út við 10 miljónir krónur dýrari, enn verandi verklagslóg sigur. - Tí verður neyðugt at broyta lógina, sigur Oyvindur Brimnes**

*- Eftir verklagslógini kann samlaða verkætlanin í Leirvík ikki fara yvir tær 40 miljónir krónurnar – og tað fer hon við teimum treytum um endurgjald, sum kommunan hevur sett, sigur stjórin í Landsverki, Oyvindur Brimnes*

LEIRVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Oyvindur Brimnes, stjóri í Landsverki, sigur, at Eysturkommuna, sum Leirvík er partur av, hevur sett nakrar treytir um endurgjald sum gera, at galdandi verklagslóg, sum hevur ein íløguloft upp á 40 miljónir krónur má broytast.

- Eftir verklagslógini kann samlaða verkætlanin ikki fara yvir tær 40 miljónir krónurnar – og tað fer hon við teimum treytum um endurgjald, sum kommunan hevur sett, sigur stjórin í Landsverki.

Oyvindur Brimnes sigur, at alt eftir, hvussu tað fer at gangast landsstýrisskvinnuni, Anniku Olsen, at finna út av verklagslógini, fer Landsverk at samráða seg fram til ein endaligan sáttmála við arbeiðstakarar.

### 50 miljónir

Stjóri í Landsverki sigur seg væl skilja, at leirvíkingar ikki vilja gerast verri stillaðir enn frammanundan.

- Eg vænti, at samlaða verkætlanin við teimum treytum, sum kommunan setir, fer at nærkast teimum 50 miljónum krónunum. Annars eru øll viðurskifti við ognartøku og samráðingum við eigarar av eitt nú gomlu neystunum lidnar, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri í Landsverki.